

Ingrid Schjølberg, professari. Mynd: NTNU/Thor Nielsen

# Vil hava sjóvinnu á tímatalvuna í skúlunum

**Jógvan Hugo Gardar**

07.05.2015 - 06:58

Oljan.fo

Sjóvinnan er ein munandi partur av norska samleikanum. Um einikki telur oljuna við, so koma 30 prosent av norska útflutninginum úr havinum. Verður oljan tikin við, so kemur 90 prosent av útflutninginum frá havinum.

Men børn og ung vita ov lítið um tilfeingi í havinum, og tey kenna ikki nóg væl sín mentanarliga sjóvinnuarv. Tað heldur Ingrid Schjølberg, professari. Hon er stjóri fyri sjóvinnutøkni á lærda háskúlanum NTNU í Tróndheimi í Noregi.

- Vit hava verið sjófólk í nógv hundratals ár, og nógv hava eisini arbeitt fisk. Í dag eri eg í iva um hvussu nógv børn og ung vita um at vit hava havt og hava eitt so sterkt tilknýti til havið, sigur Schjønberg í eini samrøðu við NRK. Hon heldur serliga at børn og ung í býunum eiga at fáa upplæring í hvat sum havi gevur.

Professarin heldur at skúlarnir eiga at hava sjóvinnu, fiskivinnu, aling og olju á tímatalvuni, so tey fáa møguleikan til at lata ein neista av áhuga jveikjast á ungum árum. Tí sum sjóvinnutjóð er neyðugt at nýggj ættarlið fáa áhuga fyri sjóvinnunum.